# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Elsa Krog**, Esbjerg, fødd Olsen, ættað úr Vestmanna, andaðist 26. mars, 71 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Jerne kirke mikudagin 31. mars klokkan 13.30.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Erikka Jacobsen**
**Haraldsund**

andaðist og varð jarðað.

Vit takka tykkum í Nirðistovu fyri røkt, umsorgan og at tit vóru so góð við hana, tíðina, hon var har. Takk tit, ið vóru so trúgv at vitja.
Takk fyri, Hanus á Gørðum, prestur, sum so hjartaliga sýndi okkum nærveru og takk fyri tey góðu og troystarríku orðini í kapellinum, heiminum og í Kunoyar kirkju.
Hjartans takk, tit organistur, kirkjutænarar, berarar, sangarar, gravarar og tit, sum bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Takk fyri heilsanir, samrøður, peningagávur til Kunoyar Kirkju, blómur og kransar.
Takk, tit mongu, sum vóru í kapellinum, og tit, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Símin, Oddvør, Jógvan Pauli, Jákup og Andrass**



## Takk

Vit vilja hervið takka øllum hjartaliga, sum gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin 22.11.2009 so hugnaligan og ógloymandi.

Takk fyri blómur, gávur, uppringingar og heilsanir og takk øll tit mongu, sum komu inn á gólvið, og ein serlig heilsan til døtur, svigardøtur og øll tykkum, sum hjálptu so væl til, tí uttan tykkum hevði tað ikki kunnað latið seg gjørt. Kærastu heilsur frá okkum og enn einaferð hjartaliga takk øll somul.

Vit ynskja eisini øllum einar gleðiligar páskir.

*Kærar heilsanir*
**Elsipa Jóhanna og John Frederiksen, Miðvágur**

**Dagurin**
30. mars. Kvirinus, deyður umleið ár 120. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.
*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008*

## Takk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á mínum 40-ára starvsdegi á Fróðskaparsetri Føroya.

Serliga takki eg Føroyamálsdeildini fyri at skipa fyri móttøku á deildini og tykkum, sum komu at heilsa upp á meg har.

Fyri allar tær vøkru og góðu gávurnar og fyri allar heilsanirnar, sum eg havi fingið, sigi eg so stóra takk.

Mest takki eg Gudi fyri at kunna vera til arbeiðis á einum so góðum arbeiðisplássi.

Eg ynski tykkum øllum einar gleðiligar páskir og Guds signing framvegis.

**Hanna S. Absalonsen**

## MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**95 ára føðingardagur**
5. apríl verður Signhild Danielsen 95 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 3. apríl hava Katrin og Ingimund Hansen Fuglafjørður silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18 fyri innbodnum.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876




Fyri 25 árum síðan:

# Teir fyrstu í nýggju útbúgvingini

Tíðindablaðið Sosialurin skrivar 30. mars 1985 um at teir fyrstu seks lærlingarnar, sum hava lokið nýggju útbúgvingina í rør- og blikksmíði á Tekniska skúla í Havn.

*Kelda: Sosialurin 30. mars 1985*

**Teir eru f.v.:** J. Magnus Ellendersen, Fámjin, Atli Leitisstein, Runavík, Heini Lassen, Tórshavn, Bent Tommy Linklett, Klaksvík, Thorleif Johannesen, Nes, og Sigurd Jón Jacobsen, Fuglafjørður

